# Hanus Kamban tekur

**Lívið er framvegis ein gáta. Men heldur enn bara at leingjast eftir tí ella skúgva tað frá sær, tekur rithøvundurin Hanus Kamban fast um lívið og tilveruna í sínum fyrsta yrkingasavni, *Café Europa*, sum kemur út í morgin**




BÓKMENTIR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Vit hittast á eini kafé. Sjálvandi. So er rætti karmurin settur fyri bæði einum práti um hansara fyrsta yrkingasavn, *Café Europa*, og aðaltáttin í stórum parti av skaldskapinum hjá rithøvundanum Hanusi Kamban. Hann viðgongur enntá at hava skrivað heil stuttsøgusøvn á kaféum ymsastaðni kring heimin.

Hanus Kamban lenar seg afturá í djúpa stólinum. Er í sínum rætta elementi onkursvegna.

- Tað er hendan kenslan av at vera partur av yðjandi lívinum og allíkavæl sleppa at sita í friði einsamallur, sum mær dámar so væl við kafélívinum, sigur hann og hyggur rundan um seg.

Altso, ein møguleiki at eygleiða lívið uttan at verða noyddur at spæla við?

- Tað kanst tú siga. Kanska hevur hesin longsulin eftir lívinum saman við óttanum fyri at taka um tað fylgt mær frá byrjan sum rithøvundur. Í so máta vóni eg, at hava savnað neyðuga dirvið til, at hetta savnið kann verða byrjanin til nakað nýtt.

## Á botn – og uppaftur

Dirvið vantar í øllum førum ikki í øllum í nýggja savninum. Neyvueyðleiðingarnar eru har framvegis, men nú bíta tær seg fast og trároyna kensluna, til hon má røkka ella støkka. Oftast røkkur hon, men ikki fyrr enn komið er heilt á botn. Eitt nú í yrkingini "Samrøða við myrkrið – trimum smádreingjum in memorian", sum tekur brókatak við eina sorg so stóra, sum fá kunnu ímynda sær.

Hóast hann helst vil lata onnur um at tulka sínar yrkingar, minnir Hanus Kamban á, at júst hendan ikki steðgar í konfrontatiónini við deyðan.

- Fyri at kunna leggja eina hending ella kenslu burtur, mást tú fyrst taka hana fram. So bara tað, at yrkingin er skrivað letur kanska upp fyri nýggjari meining – eina løtu, í hvussu er.

Yrkingin "Samrøða við myrkrið" er eisini dømi um, hvussu høvundurin við støði í ítøkiligum hendingum roynir at fevna um alheimsligar kenslur. Ella kreftir, sum til dømis í yrkingini "Golgata – morðið á Jim Kerr", ið er um morðið á ein ungan samkyndan mann.

- Eg kendi Jim Kerr, og veit framvegis ikki, um hann var samkyndur. Men tað bleiv sagt at vera orsøkin til, at hann varð álopin og dripin á gøtuni. Jim bleiv ikki dripin í Føroyum, men onkursvegna fekk hansara atburður provokerað fram nakrar kenslur í álopsmonnunum, sum ikki eru heilt ókendar um okkara leiðir, sigur Hanus Kamban, sum eisini aðrastaðni í savninum vísir seg sum sera bersøgnan viðmerkjara til okkara tíð – ella tíðarandan, um tú vilt.

## Tómir eggjakoppar

Serliga væl liggur tað fyri hjá høvundanum, tá spei verður amboðið at siga ein sannleika ella báðar tveir. Ikki minst í yrkingini "Tíðarprinsar", har smartir mappudreingir við teirra 'konseptum' og 'branding' og 'synergieffektum' verða latnir úr, til bara nakrir 'útblástir eggjakoppar' liggja eftir.

Hóast Hanus Kamban viðgongur, at hann brúkti lutfallsliga stutta tíð at skriva yrkingina, endar hon við at fylla rættiliga nógv í prátinum eina løtu. Ikki so løgið kanska, tí sambært høvundanum hava 'tíðarprinsarnir' serliga góðar dagar í Føroyum beint nú.

- Teirra serøki er jú at skora bílig poeng í eini ótryggari tíð, har tað er serliga freistandi at leita og lurta eftir løttum loysnum. Og sjálvt um teirra loysnir ferð eftir ferð vísa seg at verða tómar sápubløðrur, eru teir framvegis altíð klárir. Ein kann bara undrast yvir, at teir ikki hava størri sjálvkritiskan sans, grunar høvundurin.

Tíðarprinsarnir eru bara ein útgáva av mongu sjálvsupptiknu sálunum, sum ferðast gjøgnum *Café Europa* og royna at fóta sær sum frægast. Ofta endar leiðin í so djúpum einsemi, at tað gerst beinleiðis ræðandi. Eitt nú í prosabrotinum "Tann samanklamsiligi", har tú ikki veist, um tú skalt flenna ella gráta, tá kvinnan tekur ein samanklamsligan mann upp úr taskini, so